Lagt til rættis: **Inna Tørnroos**

# SOLEIÐIS GEKST SUPERMODELLU



CINDY, CLAUDIA, NAOMI, LINDA OG CHRISTY VÓRU TÆR **FYRSTU** VERULIGU **SUPERMODELLIRNAR**. TÆR KOMU FRAM Í 90-UNUM, FORVUNNU **MILLIÓNIR** OG VÓRU AT SÍGGJA Í ØLLUM BLØÐUM. NÚ ERU 20 ÁR LIÐIN, TÆR ERU Í **40-UNUM**, OG VIT HAVA FUNNIÐ ÚT AV, HVAT TÆR GERA NÚ

## **LINDA** EVANGELISTA

**Aldur**: 44 ár
**Familja**: Sonurin Augustin, 3 ár og sjeikurin Peter Morton, 63 ár.
**Starv**: Starvast enn sum modell fyri millum annað L'Oreal og John Galliano.
**Bústaður**: New York og Los Angeles



### »Nú havi eg alt sum eg havi droymt um«

Tað sitat sum Linda Evangelista er mest kend fyri er: »Eg fari ikki úr songini fyri minni enn 10.000 dollarar um dagin«.

Hon er fødd í Kanada og visti longu sum 12-ára gomul, at hon vildi gerast modell.

Linda var ein tann fyrsta supermodellin, og í endanum av 80-unum gjørdist hon sera vælumtókt við sínum stutta, dreingjahári. Hon skifti oftani útsjónd og bleiv tí kalla fyri »kameliónin«.

Linda gavst at starvast sum modell í 1998, tá hon hitti fótbóltsspælarin Fabien Barthez. Men byrjaði aftur í 2001, og var kløkk av, at hon sum 36 ára gomul enn var vælumtókt sum modell.

Linda hevur leingi vilja verið mamma, og fyri trimum árum síðani gjørdist tann dreymurin veruleiki, tá sonurin Augustin kom til verðina. Sama ár hitti hon eisini mannin í sínum lívi, Peter Morton.

– Nú er mítt lív fullkomið, alt handlar um Augustin. Eg kenni meg vælsignaða, og í dag havi eg alt, sum eg nakrantíð havi droymt um, hevur hon sagt við blaðið ELLE.

## **CINDY** CRAWFORD

**Aldur**: 44 ár
**Familja**: Maðurin Rande Gerber, 48 ár og børnini Presley, 10 ár og Kaia 8 ár.
**Starv**: Hevur fleiri egin merki innan skógvar, vakurleika og inrætting. Modell fyri klokkurnar Omega.
**Bústaður**: Malibu



### »Í dag hevði eg ikki blivið supermodell«

Cindy Crawford er helst tann kendasta av supermodellunum. Hon er fødd í einum lítlum býi í USA, og varð uppdagað sum modell, tá hon arbeiddi á einum majsákri. Hon var dugnalig í skúlanum, men gavst og satsaði alt upp á at gerast modell.

Fyri tíggju árum síðani gavst hon sum modell. Hon segði við týska blaðið Bunte, at hon orkaði ikki at samanberast við 20-ára gamlar modellir. Cindy hevur eisini funnist at teimum sera klønu modellunum í dagsins mótaheimi.

- Eg hevði ongantíð blivið modell ídag, eg síggi ov sunn út við mínum normala kroppi, sigur hon.

Cindy Crawford var eitt skifti gift við sjónleikaranum Richard Gere, men nú er hon gift við Rande Gerber, og tey hava tvey børn saman.

Hon arbeiður enn eitt sindur sum modell, men mest fæst hon við síni egnu merki innan skógvar, vakurleika og inrætting.